# Boksin – Vinnarin er Torfríð Tausen




**Í gjárkvøldið varð avdúkað, hvør ið hevur havt ta bestu framførsluna í sangkappingini "Boksin". Og tað var unga gentan úr Sørvági, Tórfríð Tavsen, sum streyk avstað við fyrsta plássinum.**

SANGKAPPING

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Boksin er ein sangkapping, sum hevur ferðast kring landið. Boksin hevur staðið í Telebúðinum í Tórshavn, Klaksvík, Miðvági, Tvøroyri og Saltangará. Kappingin er skipað soleiðis, at tú trínur inn í eina afturlatna boks, og her leggur rødd til ein kendan sang. Tín framførsla verður upptikin á video, og síðan metir ein dómsnevnd um tí framførsla er nóg góð, at fara víðari í eina finalurundu, sum gongur fyri seg á alnótini. Dómsnevndin velur fimm tær bestu framførslurnar út frá hvørjum øki, og hesar verða lagdar á síðuna http://www.olivant.fo/boksin.

Klokkan var júst farin av 20, tá ið dyrnar vórðu latnar upp inn í salin í Havnar Bio. Føroya Tele hevði skipað soleiðis fyri, at avdúkingin av vinnaranum í sangkappingini Boksin varð løgd saman við frumsýningini av nýggja James Bond filminum "Casino Royal". Salurin var á tremur við fólkið, sum høvdu leitað sær inn í Havnar Bio hesa spennandi løtu. Sangkappingini fór av bakkastokki tann 23. oktober, og nú ein mánað aftaná, kundi vinnarin skírast.

**Avdúkingin**

Kári Annand Berg var maðurin, sum skuldi avdúka vinnararnar. Fyrst handaði hann Drós R. Joensen og Laila Pætursdóttir hvør sína X-Box, sum var vinningurin fyri triðja plássið í kappingini. Valborg Johannensen fekk annað plássið, og fyri tað fekk hon eina farteldu.

Síðan var spennandi løtan komin. Nú skuldi vinnarin avdúkast. Og vinnarin av "Boksin 2006" gjørdist Tórfríð Tausen úr Sørvági. Eitt sindur smæðin kom hon upp at taka ímóti einum kekki áljóðandi kr. 15.000.

Áskoðararnir fingu høvi at síggja hennara framførslu á stóra skíggjanum í Havnar Bio, og var hetta sjón fyri søgn – Hon er ein óført songkvinna.

Hon sang kenda lagið "The Final Countdown", og hetta sang hon somikið væl, at føroyingar hava avgjørt, at hennara framførsla var tann besta av øllum.

**Fyriskipararnir væl nøgdir**

Eini 180 framførslurnar hava sungið í Boksini. Heili 2700 føroyingar hava sms´a tann ið tey halda verða best. Kári Annand Berg, fyriskipari, sigur at tey á Føroya Tele eru sera vælnøgd við tiltakið. --Tá eg kom heim í gjárkvøldið var eg sera glaður. Alt hevur gingið eftir ætlan, og har er onki at seta fingur á, greiður Kári frá.

-Eg haldi, at við hesum tiltakið hava vit broytt ímyndina av Føroya Tele millum tey ungu. Vit hava merkt, at sera nógv ung hava flokkast um tiltakið, so hetta er avgjørt eitt tiltak sum verður endutikið komandi ár, sigur Kári Annand Berg at enda.

Tú kanst síggja framførslurnar hjá Torfríð og øllum øðrum við at kaga inn á heimasíðuna hjá Boksini.

# Rasmus gevst í Makrel

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í einum stuttum boðum á kjak.fo í morgun boðar Rasmus Rasmussen nú fyrrverandi gittarleikari í Makrel frá, at hann gevst í bólkinum, ið hann hevur verið ímyndin av seinastu árini.

**Hey øll.**

Eg boði hervið frá, at eg av persónligum ávum ikki longur kann spæla við í Makrel.

Eg vil takka hinum limunum í Makrel fyri samstarvið gjøgnum árini.

Eg takki somuleiðis okkara fjepparum fyri stuðulin.

Alt tað fagrasta,
Rasmus Rasmussen.

Soleiðis ljóða stuttu boðini, ið Føroya besti gittarleikari sambært AME, hevur skrivað. Hetta er ein stórur missur hjá Makrel, ið við serliga gittarspælinum hjá Rasmusi og messandi effektmanipuleraðu røddini hjá Ára Rouch er vorðin eitt stórt navn í føroyskum tónleiki.

Hvørjar ætlanirnar hjá Rasmusi eru framyvir er ógreitt. Tað hevur ikki borið til at fingið orð á Rasmus í morgun, men tað skilst, at tað er heilsustøðan, ið er orsøk til, at Rasmus nú gevst. Vónandi betrast heilsustøðan, so at hetta ikki er tað síðsta í vit hoyra frá hesum meistarliga gittarleikara. Heldur ikki er greitt, hvat hendur við Makrel, tí bólkurin hevði ikki fingið boðini, tá ringdu til teir í morgun. Sangarin Ári Rouch hevði onga viðmerking, tí hann einki visti um hetta. Makrel hevði Una R. Debess sum avloysara fyri Rasmus á konsertini, ið bólkurin spældi á Nordatlantisk Musikfestival í Keypmannahavn fyrr í heyst. Tá bar Rasmus seg undan av heilsuávum, eftir at hann hevði verið fyri ógvisligum ágangi og morðhóttanum fyri sína kynsligu sannføring.

Rasmus var við til at stovnað Makrel og hevur við sínum serliga gittarspæli skapt ljóðmyndina hjá Makrel, og tað er eingin ivi um, at hansara avgerð um at fara úr bólkinum, fer at hava stóra ávirkan á bólkin. Makrel er sprottin burtur úr bólkinum Happy?, ið Rasmus og fleiri av hinum makrelunum spældu í. Bólkurin luttók á Prix Føroyum og hevði eitt lag á fløguni Grótføroyskt, áðrenn Rasmus fór burturúr. Hann byrjaði í staðin í Diatribes, meðan Happy? helt fram við skiftandi gittarleikarum.

Makrel hevur givið 3 fløgur út, meðan Rasmus sum einstaklingur hevur givið eina fløgu út Implosive frá 2002.

